## DAGSINS MEINING

# Varlig fíggjarlóg

Tað eru ikki tey stóru sveiggini, ið eyðkenna uppskotið til fíggjarlóg fyri 2006, sum Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, legði fyri løgtingið fríggjadagin 30. september. Heldur er talan um eina sera varliga fíggjarlóg uttan nakrar óvæntaðar broytingar. Uppskotið skal metast við teimum ógvulsiga vaksandi oljuprísunum og fallandi inntøkunum í fiskivinnuni sum bakstøði. Tað er eingin lættur setningur at seta saman eina fíggjarlóg undir hesum umstøðum. Oljuprísirnir hótta ikki bara føroyska búskapin, men teir hótta allan búskapin í Vesturheiminum.

Undir hesum umstøðum hevur landsstýrissamgongan við fíggjarlógaruppskotinum valt at reka ein politikk, sum hevur til endamáls at varðveita virksemið í landinum, samstundis sum rakstrarútreiðslurnar verða tálmaðar. Hetta merkir, at fíggjarmálaráðharrin bert nýtir løgurnar sum amboð. Hann nýtir ikki restina av skipanini. Hann letur bert pening í umfar innan byggi- og anleggsvirksemi, meðan hann tálmar almennu lønunum. Hetta kann soleiðis við fyrsta eygnabráð tykjast skilagott, men spurningurin, hvørt tað er gott á henda hátt at tálma nýtsluna, stendur opin. Kanska eydnast hetta, kanska eydnast hetta ikki. Og er hetta tða okkum tørvar júst nú? Tað er uttan iva skilagott at halda aftur vil lønarvøkstri hjá tí almenna, men er tað skilagott at halda so nógv afturvið rakstrarútreiðslunum, at fólk gerast arbeiðsleys? Ein bøtir ikki um arbeiðsloysið í privata sektorinum við at reka almenn starvsfólk út í vinnuloysi. Einki er sett av til lønarvøkstur. Hetta kann bert merkja, at tað, sum tey alment settu møguliga fáa afturat við verandi lønarsamráðingum, fara limirnir í avvarandi feløgum at rinda við færri størvum! Hetta eru beisk kor hjá samráðingarfólkunum, men sum búskaparliga og fíggjarliga støðan er, er væl einki val.

Landsstýrið upplýsir, at eldrarøkt, útbúgving og heilsa eru raðfest øki í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006. Hetta ljóðar sera skilagott, men ásannast má samstundis, at hetta er ikki heilt so einfalt, sum tað er sett upp. Víst fáa fólkaskúli og miðnámskúlaøkið størri játtanir. Tað er skilagott, men samstundis so minka ávísir hægri skúlar, meðan aðrir, eitt nú Fróðskaparsetrið, standa í stað. Her hongur ikki saman og hetta er ikki skilagott. Nakað er komið uppá granskingina, men hálvonnur millión virkar beinleiðis pínligt, tá hugsað verður um alt tosið seinasta árið um gransking og menning og hartil, at løgmaður hevur lovað eina milliard til økið hetta til 2015. Her er sostatt so sum so við raðfestingini á útbúgvingar- og granskingarøkinum. Her mugu heilt aðrar upphæddir til í 2007 og árini fram, um borgararnir skulu taka politikkararnar í álvara!

Tað er sjálvsagt at fegnast um, at eldrarøkt og heilsa eru raðfest í fíggjarlógaruppskotinum. Men aftur her eru tað mest á løgusíðuni. Raðfestingarnar á rakstrarsíðuni kunnu undra eitt sindur, men hetta fara vit at venda aftur til í eini komandi oddagrein. Nakrar nýggjar inntøkur eru eisini. Soleiðis verður tubbakk dýrari og vektagjaldið hækkar 40%. Hetta er væl einki at siga til, uttan at tað gera valla tann stóra munin. Tað, sum hevði munað, var at sleppt øllum ætlanum um skattalætta og heldur roynt at fingið eina rættvísari skattalóg, sum gav meira í landskassan, samstundis sum byrðarnar vórðu rættvísari býttar enn í dag. Vit venda sum longu nevnt aftur til fíggjarlógaruppskotið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Uppvenjingarmiðstøð eigur at gerast á Suðuroyar Sjúkrahúsi

**Johan Dahl,**
**løgtingsmaður**



Út av lagi vánaligar og óhóskandi umstøður í svørtu barakkini á LS.

Tað hevur verið frammi av og á, at viðurskiftini á uppvenjingardeildini á landssjúkrahúsinum fyri fólk, sum hava havt heilabløðingar, blóðtøppar og arðar likamligar skaðar á Landssjúkrahúsium, als ikki er nøktandi.

Tey bíða leingi til at sleppa til uppvenjingar, og summi koma ongantíð ella ov seint til uppvenjingar.

Gamla barakkin oman fyri Landssjúkahúsið, sum verður brúkt sum partur av hesi uppvenjing - er als ikki nøktandi.

Tað eru eisini nógvir røktarsjúlingar, sum er á hesi deild, og eru umstøðurnar á deildini út av lagi vánaligar.

Korini fyri starvsfólkið at virka undir, eru langt frá optimal

Hesin bygningur eigur antin at verða gjørdur í stand ella tikin niður - havi skilt á starvsfólki, at regnar illa so dryppar niður úr lampustøðum, og tá er trygdin hjá sjúklingum og starvsfólki í vanda.

Tað hevur verið tosað um at gera nýggja uppvenjingarmiðstøð í Tórshavn.

Suðuroyar Sjúkrahús hevur neyðugu karmarnar til eina nýmótans uppvenjingarmiðstøð.

Á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru sera, sera góðar umstøður til uppvenjing av sjúklingum, og eigur politiski mynduleikin saman við sjúkrahúsleiðsluni at taka málið upp, um tað ikki er ein sera skilagóð loysn at gera hesa miðstøð á Suðuroyar Sjúkrahúsi á Tvøroyri.

Tað kann ikki verða rætt at fara at hugsa um at byggja enn eina miðstøð í meginøkinum, tá góðar umstøður longu eru tilstaðar í Suðri til slíka uppvenjingar.

Tað vildi verið ein lítil íløga at gjørt tað sum evt. er neyðugt afturat, tí verandi fyrioterapi er væl útgjørd, og har eru allir fasisiltetir til staðar, eins og fysioterapeutar eru tøkir.

Skulu arðir viðgerðarar/-terapeutar til, so er at seta hesar í starv, tað vil eisini verða gott fyri økið at fáa fleiri almenn arbeiðspláss.

Neyðugt er at gera umhvørvið fyri sjúklingarnar gott og trygt, og tískil vildi tað eisini verið ein loysn at gjørt t. d. »skemmina« sum liggur á sjúkrahúsøkinum til íbúðir fyri tey, sum skulu uppvenjast og avvarðandi við, um hesi hava brúk fyri fylgjarum.

Alternativið er at gera íbúðir serliga til hesi fólk í nærhendis av sjúkrahúsinum.

### Ferðasambandið ongin forðing

Ferðasambandið við nýggja Smyrli ger tað lætt at ferðast til og frá Suðuroynni framvyir, og umstøðurnar umborð á Smyrli eru fyrsta floks, so tað er eyðsæð, at hesin møguleikin eigur at kannast og gerast til veruleika.

Hendan loysn hevði verið góð bæði fyri sjúklingarnar og Suðuroyar Sjúkrahús.

# Jú, skonkt varð á Summarfestivalinum

**Leif Láadal,**
*tíðindafólk, Útvarp Føroya*

Í lesarabrævi farna vikuskiftið biðja Steintór Rasmussen og hinir fyrireikararnir av Summarfestivalinum í Klaksvík um eina rættleiðing og eina umbering frá mær og Útvarpi Føroya.

Lat tað vera sagt beinanvegin: Tað fáa teir ikki.

Hvørki eg ella tíðindadeildin í útvarpinum fara at umbera ella rættleiða nakað, sum ikki er skeivt.

Sum tað var sagt í tíðindasendingini fríggjadagin á døgurða, so varð ikki nevnt nakað árstal í tíðindunum kvøldið fyri, har sagt varð at »á summarfestivalinum varð største uttandura barr her um okkara leiðir uppstillað«. Tað vildi verið rættari, um vit søgdu »á summarafestivalinum í fjør«, og tað harmast vit, at vit ikki gjørdu. Men tað broytir ikki tann veruleika, at tað varð selt sterkt øl uttandura á Summarfestivalinum í fjør. At barrin var stór, er eisini ein veruleiki, men tá ið barrir vanliga ikki eru uttandura í Føroyum (eingin hevur loyvi at skeinkja uttandura, heldur ikki tey, sum hava skeinkiloyvi), so skal ikki so nógv til fyri at kunna siga, at barrin á Summarfestivalinum var stór.

Fyrireikararnir gera sær stóran ómak, tá ið teir í lesarabrævinum siga: »Vit vilja við hesum gera púra greitt, at tað varð eingin almenn ella ólóglig skeinking á summarfestivalinum í 2005«.

Í tíðindainnslagnum hóskvøldið í farnu viku verða fýra dømi um ólógliga skeinking nevnd - tvey aktuel dømir, og tvey, sum ikki eru hend í ár. Fyrireikararnir av Summarfestivalinum loyvdu ikki ólógligari útskeinking í ár, men tað gjørdu teir í fjør. Útvarp Føroya hevur ikki sagt, at Summarfestivalurin skonkti í ár, tískil kann ynskið hjá fyreikarunum um, at »skeivu tíðindini beinanvegin verða rættað, og at Summarfestivalurin fær eina umbering«, ikki gangast á møti.

Eftir stendur, at Summarfestivalurin hevur rættað útskeinkingarmistakið frá í fjør, men samstundis má ásannast, at ólóglig útskeinking varð framd í 2004. Høvdu fyrireikararnir skrivað: »Vit vilja við hesum gera púra greitt, at tað varð eingin almenn ella ólóglig skeinking á summarfestivalinum í 2004«, so var talan um eina beinleiðis lygn.

Tað er harmuligt at verða lagdir undir at bera villleiðandi og skeiv tíðindi, tá ið veruleikin er ein annar, men vónandi kunnu hesi fáu orð bøtu um tað.

Eg skilji væl, at fyrireikararnir verða noyddir at verja borg, men tað ber ikki til av órøttum at skjóta journalistar fyri at verja teir skeivleikar, sum eru gjørdir.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.